

# Matiné í Dómkirkjuni

Leygardagin 19. juli verður matiné í Havnar Kirkju, har nakrir av okkara ungu tónleikarum fara at spæla. Teir hava allir fingið útbúgving í Føroya Musikkskúla, og nakrir av teimum fáa sær nú víðari útbúgving á konservatorium uttanlands. Tað eru millim annað violin-, bratsch- og cellospælararnir Jákup Lützen, Heiðrun Petersen, Pól Jespersen og Andreas Restorff, sum spæla satsir úr strúkikvartet av Dvorak og Smetana. Jón Festirstein og Andreas Restorff fara at spæla duet og eisini aðrir ungir tónleikarar verða við.

# Kinverskar myllur hava undanvind

Kinverskir framleiðarar av vindmyllum hava seinnu árini tikið stór fet fram á heimsmarknaðinum. Fyri bara fáum árum síðani var kinverski parturin bert ein viðfáningur á marknaðinum, men í dag teljast bæði Goldwind og Sinovel millum 10 teir størstu framleiðararnar í heiminum. Í dag eru yvir 40 kinverskir framleiðarar á marknaðinum. Eitt stórt tal, sum partvíst kemst av alsamt vaksandi kinverska orkutørvinum, men eisini tí myndugleikarnir krevja, at 70% av lutunum í eini nýggjari vindmyllu skulu stava frá lokalum framleiðarum.




**Lagt til rættis:** Rigmor Dam

# 4 prosent omaná eftir hálvum ári

Sosialurin hevur samanborið eitt innkeyp, sum vit gjørdu 15. januar í ár, við prísin á somu vørum í dag. Í januar skrivaðu vit um, at tað er hundadýrt í Føroyum og samanbóru prísin í Danmark og í Føroyum.

Hesaferð hava vit samanborið føroysku prísirnir tá, við prísin í dag. Ikki óvæntað er kostnaðurin hækkaður, nevniliga við 4 prosentum bara hetta seinasta hálva árið. Sigarettirnar seta seg fyri ein góðan part av vøkstrinum, men eisini vanligar matvørur eru hækkaðar nógv. Okkara innkeyp samsvarar eisini við hækkingina í brúkaraprístalinum fyri seinastu ársfjórðingarnar, og prógva bara, at tað er vorðið dýrari at vera føroyingur.

**Príssamanbering av somu vørum í dag og fyri einum hálvum ári síðani.**

| Handil: FK í Hoyvík | 15. Jan. 2008 | 15. Juli 2008 | Broyting |
|---|---|---|---|
| 1/1 óskorið rugbreyð 1 kg. | 27,50 | 27,50 | 0,00 |
| 1/1 groft rugbreyð 500 g. Omega | 28,50 | 29,75 | 1,25 |
| 1/1 vanligt fransbreyð | 18,00 | 19,25 | 1,25 |
| 1 l. av søt-mjólk | 10,50 | 11,25 | 0,75 |
| ¼ l. av pískiróma | 10,25 | 11,15 | 0,90 |
| 2 kg. av eplum | 24,95 | 19,95 | -5,00 |
| 1 kg. av sukuri | 7,95 | 8,95 | 1,00 |
| 1 pk. av farin | 13,95 | 9,95 | -4,00 |
| 1 Buko smyrjiostur v. rækjum | 19,95 | 19,95 | 0,00 |
| 8 fruktir | 20,00 | 24,00 | 4,00 |
| Malið oksakjøt pr. kg. uml. 10 % feitt | 57,50 | 59,95 | 2,45 |
| 275 g. Taffel chips | 29,95 | 29,95 | 0,00 |
| 20 Prince | 43,00 | 48,00 | 5,00 |
| 250 g. Kærgaarden | 13,95 | 15,95 | 2,00 |
| 1 kg. av leyki | 11,95 | 14,95 | 3,00 |
| Ota Solgryn 950 g. | 19,95 | 21,95 | 2,00 |
| | **357,85** | **372,45** | **14,60** |

*Sosialurin innheintaði prísirnir 15. jan . 2008 og 15. juli 2008*

*Sama innkeyp er 14,60 kr. dýrari í dag enn í januar. Hetta er ein øking á 4,08 prosent.*




# VOX-POP

**Sosialurin spurdi fólk, sum vóru til handils í gjár, hvat tey velja frá, nú vørurnar eru dýrkaðar so nógv**



**Margreta og Ólavur Clementsen, Hoyvík**

Vit kenna væl á okkum, at alt er vorðið dýrari. Fyri umleið tveimum mánaðum fóru vit at baka alt breyði sjálvi, tí tað er so dýrt at keypa. Eisini royna vit at spara bensin við at koyra buss, har tað ber til.



**Hallur og Randi Johannesen og 6 ára gamla Ada, Hoyvík**

Vit hava sanniliga uppdagað, at alt verður nógv dýrari nú. Tí royna vit at spara allastaðni, millum annað verður góðgæti spart burtur. Men hóast vit royna at liva heilsugott, so er tað ikki so lætt, tí góðu vørurnar dýrka eisini. Tað átti at verið bíligari at liva sunt, til dømis átti soltið viðskera, frukt og sukurfríar vørur at verið bíligari. Men soleiðis er tíverri ikki.



**Eyð Eidesgaard við børnunum Maria og Martin, Kollafirði**

Jú, eg havi varnast at alt er dýrkað, men higartil hevur tað ikki broytt okkara innkeypsvanar. Havi altíð roynt at spara, til dømis við ikki at koyra mat í skrell, men at brúka allar restirnar.